Munnligur fyrispurningur
eftir § 52 í Tingskipanini

Spyrjari: Hanna Jensen, løgtingskvinna

Svarari: Eirikur í Jákupsstovu, landsstýrismaður í almanna- og mentamálum

Evni: Týðing til føroyskt

Spurningar:

1) Hvussu nógv tilfar verður týtt til føroyskt um árið innan økið hjá landsstýrismanninum?
2) Hvør týðir tilfar til føroyskt, og hvat slag av tilfari týða tey?
3) Hvussu nógv fíggjarorka verður tilsamans nýtt til at fáa til vegar týtt tilfar til føroyskt árliga innan økið hjá landsstýrismanninum?
4) Metir landsstýrismaðurin, at serlig orka skal leggjast afturat til at stimbra týðing til føroyskt, og um ja, hvussu verður hetta so gjørt á besta og munadyggasta hátt?

Viðmerkingar:
Sambært granskarum innan økið, so er týðing eitt alneyðugt íkast í arbeiðinum hjá smærri málsamfeløgum at tryggja sær nóg mikið av dygdargóðum og áhugaverdum lesitilfari, miðlatilfari og øðrum mentanartilfari, á tí máli, sum verður tosað í teimum samfeløgunum.

Í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina fyri 2025 varð umrøtt, hvussu nógv fíggjarorka mundi vera nýtt til týðing til føroyskt mál tilsamans. Tað var ikki heilt greitt, og ivi er um, hvussu nógvir ymiskir partar lyfta uppgávuna at týða til føroyskt, hvussu tað verður lagt í ætlan, hvussu tað verður fíggjað og stimbrað á ymsan hátt. Og ein viðkomandi spurningur er kanska, um nóg mikið verður týtt, og um alt tað mest viðkomandi verður týtt.

Sólvit E. Nolsø, tingmaður, setti hin 19. mars í ár eisini landsstýrismanninum munnligan spurning í Løgtinginum um, m.a. hvørt ætlanir eru at hækka játtanina til Týðaragrunn Landsins. Orðaskiftið um hetta fevndi víða og vórðu nevndar ymsar puljur og ymsir miðlar og ymisk listaøki, har stórur tørvur er á føroyskum tilfari – eisini týddum.

Av tí at føroyskt mál er undir trýsti og harvið útbúgving, mentan og alt samfelagið á føroyskum er undir trýsti, er helst neyðugt at arbeiða á fleiri mótum samstundis fyri at styrkja støðuna hjá føroyskum sum samfelagsbærum máli og sum málið, alt fólkið, sum býr í Føroyum, nýtir hvønn dag og í øllum lívsins viðurskiftum.
Tí verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 23. apríl, 2025

Hanna Jensen